Sólstrálur eru sunnar

Tað hevur verið nógv tosað um, at sterkar sólstrálur elva til húðkrabba. Hetta sigur Hans Storm, sum er yvirlækni hjá Kræftens Bekæmpelse. Møguleikin at yvirliva sjúkuna er í veruleikanum 100%, tí tey raktu liva vanligt longri enn tey, ið ikki hava sjúkuna. Hann vísur eisini á, at tey, ið verða rakt av húðkrabba, oftast liva eitt sunt lív.



Tokvanlukka í Amerika

Ein ógvusligur samanstoytur millum eitt tok og ein bil í Amerika kravdi í gjár fýra mannalív. Tokvanlukkan hendi í býnum Tampa í landspartinum Florida, og øll tey deyðu eru tannáringar. Tannáringarnir koyrdu í bili teirra, tá ið tey av ósketni komu frammanfyri tokið. Bresturin var so harður, at bilurin lendi heilar 274 frá staðnum. Í morgun hevur framvegis ikki verið møguligt at eyðmerkt líkini.

Bjarni Djurholm fær krakk

Hann vil hava fakfeløgini og arbeiðsgevararnar at vera við í eini nevnd at endurskoða barsilsskipanina, men feløgini siga kortanei

BARSILSSKIPAN
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Hóast nógvar atfinningar hava heglað niður yvir barsilsskipanina seinastu tíðina, er onki, sum bendir á, at hon verður endurskoðað við bræði.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum hevur ætlað at seta eina nevnd at endurskoða barsilsskipanina og í hesi nevndini skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum vera umboðaðir, bæði fakfeløg og arbeiðsgevarar.

Men feløgini siga kortanei og tey nokta sostatt at vera við í nevndararbeiðnum.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at fakfeløgini og arbeiðsgevararnir hava sent landsstýrismanninum bræv, har tey gera greitt, at tey eru ikki sinnað at vera við í eini nevnd, sum skal endurskoða barsilsskipanina.

Feløgini siga, at tey eru ikki sinnað at vera við í eini nevnd at endurskoða barsilsskipanina, fyrrenn skil er fingin á ALS.

- Viðurskftini í ALS eru út av lagi og vit eru ikki sinnað at fara undir at endurskoða barsilsskipanina, fyrrenn vit fyrst hava fingið skipað viðurskifti í ALS.

Barsilsskipanin er stutt síðani broytt og vit halda ikki, at tað er nøkur orsøk at broyta hana longu aftur nú, samstundis sum ALS flýtur.

Tað nyttar ikki at hava fleiri bóltar í luftini ísenn og so missa allar á gólvið. Tí vilja vit hava ALS í rættlag, áðrenn vit fara víðari.

Skattur ella ikki

Tað, sum Ingeborg Vinther hugsar um, er, at enn er ongin avgerð tikin um, hvussu inngjaldið inn í ALS skal definerast.

Fleiri politikarar halda, at inngjaldið í ALS er ein skattur og at skipanin tískil skal á figgjarlógina.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum vilja ikki oyra talan um tað. Teir tvíhalda um, at inngjaldið er eitt arbeiðsmarknaðargjald og at ALS er ein grunnur, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir skulu umsita og hava fult ræði.

Teir hava eisini lovað ilt, taka politikararnir ræði á ALS og leggja skipanuna inn undir vanligu figgjarlógina hjá landskassanum.

- Politikararnir hava lovað okku at fáa greiði á hesum viðurskiftunum, men tað hendir akkurát onki. Men vit hava avgjørt, at vit fara ikki í holt við at endurskoða barsilsskipanina, fyrrenn politikararnir hava hildið lyftið um at fáa viðurskiftini í ALS í rættlag, sigur Ingeborg Vinther.

- Vit røra ikki Barsilsskipanina enn, tí politikararnir skulu fyrst halda lyftið um at fáa viðurskiftini í ALS í rættlag, sigur Ingeborg Vinther

Arbeiðssetningurin

Í samband við ætlanina at endurskoða barsilsskipanina, sum er umrøtt í hinari greinini her á síðuni, hevur Bjarni Djurholm gjørt nevndini hendan arbeiðssetningin:

Arbeiðsbólkurin skal endurskoða Barsilsskipanina í síni heild, heruppií gera neyðugar tekniskar tillagingar. Harumframt skal arbeiðsbólkurin m.a. viðgera longd og býti av farloyvistíðini millum mammu og pápa, útgjaldstíðina sum heild og viðurskiftini viðvíkjandi inngjaldi til pensjónsskipanir v.m. í farloyvistíðini.

At enda skal arbeiðsbólkurin gera uppskot um umskipan av Barsilsskipanini til grunn og í hesum sambandi viðgera støðu grunsins í mun til stýrisskipanarlógina."

Ætlanin var, at arbeiðið skuldi vera liðugt 1. januar.

Men sum tað sæst á aðrari grein í blaðnum, hevur ætlanin fingið eitt rættiligt skot fyri bógvin, tí feløgini ár arbeiðsmarknaðinum nokta fyri at fara í ein arbeiðsbólk at endurskoða barsilsskipanina, fyrrenn viðurskiftini viðvíkjandi ALS eru fingin í rættlag.

Vágbingar fáa eitt hálvt ár

Á nýggjárinum skulu øll hús í Vági hava rottanga. Um neyðugt fer kommunan at seta tangar upp fyri fólkmen tey noyðast sjálvi at betala

REINFØRI
Áki bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tað eru heilt nógv hús í Vági, sum framvegis ikki hava rottangar, men har alt skarn rennur í áirnar og endar í mølini og á sjónum.

Men nú skal ein endi fáast á hesum.

Vágs Býráð hevur samtykt, at á nýggjárinum skulu øll hús í Vági hava rottangar.

Teir vágbingar, sum ikki longu hava rottangar, fáa sostatt eitt hálvt ár til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Tað hava tey húski í Vági, sum ikki hava rottanga, fingið bræv frá kommununi um nú um dagarnar.

Og har stendur eisini, at tey, sum ikki hava fingið viðurskiftini í rættlag á nýggjárinum, kunnu vænta sær, at kommunan setir rottangan upp fyri tey, men tað verður so framvegis húseigarin´, sum má betala fyri arbeiðið.

Tað eru góð 500 hús í Vági og av teimum eru tað væl yvir 100, sum enn ikki hava rottanga.

Sum skilst, er tað ikki nakað eindømi, at hús í Vági ikki hava rottanga, tí tað hava nógv hús aðrastaðni heldur ikki.

Men tað skilst kortini, at í Vági er støðan í tí verra endanum, tí tað er ikki á nógvum so stórum plássum, eitt so munandi tal av húskum ikki hevur rottanga.

Tað eru yvirhøvur nógv av teimum gomlu húsunum, sum ikki hava rottanga.

Í Vági eru tað framvegis væl yvir 100 hús, sum ongan rottanga hava. Men nú skal skil fáast á tey viðurskiftini og freistin er eitt hálvt ár